Skjal A

Til Rættarnevndina
Føroya Løgting

Tórshavn 12. mai 2019

**Viðmerkingar til løgtingsmál 53/2019 Uppskot til samtyktar um at løgtingslóg um innlit í fyrisitingina eisini skal galda fyri almenn partafeløg**

Fyrst av øllum vilja Føroysk Miðlafólk takka fyri innkalling í hoyring og møguleikan at siga okkara hugsan í samband við hetta málið. Føroysk Miðlafólk er av tí greiðu fatan, at øll almenn partafeløg eiga at vera fevnd av lógini um alment innlit. Í dag er P/F Visit Faroe Islands einasta, almenna partafelag, ið innlit fæst í, og er hetta nevnt positivt í §6 í lógargrundarlagnum undir VFI. Í hoyringini mikudagin í síðstu viku nevndu vit, at alment innlit í almenn partafeløg er ikki ókent í okkara grannalondum.

Í Danmark er innlitslógin galdandi fyri almenn partafeløg, har tað almenna eigur meira enn 75% av partapeninginum. Undantakið eru fyritøkur, skrásettar á keypsskálanum. §4 í donsku innlitslógini er soleiðis orðað:

*§ 4. Loven finder bortset fra bestemmelserne i §§ 11 og 12 og §§ 15-17 anvendelse på al virksomhed, der udøves af selskaber, hvis mere end 75 pct. af ejerandelene tilhører danske offentlige myndigheder. Det gælder dog ikke børsnoterede selskaber og disses datterselskaber.*

Í Norra er útgangsstøðið, at innlitslógin er galdandi fyri allar fyritøkur, sum tað almenna eigur meira enn helvtina av. §2 í norsku innlitslógini er soleiðis orðað:

*§ 2.Verkeområdet til lova*
*Lova gjeld for*
*a) staten, fylkeskommunane og kommunane,*
*b) andre rettssubjekt i saker der dei gjer enkeltvedtak eller utferdar forskrift,*
*c) sjølvstendige rettssubjekt der stat, fylkeskommune eller kommune direkte eller indirekte har ein eigardel som gir meir enn halvparten av røystene i det øvste organet i rettssubjektet, og*
*d) sjølvstendige rettssubjekt der stat, fylkeskommune eller kommune direkte eller indirekte har rett til å velje meir enn halvparten av medlemmene med røysterett i det øvste organet i rettssubjektet.*

Undantøk eru tó frá ásetingini um innlit, og nøkur almenn partafeløg eru nevnd positiv sum feløg, ið innlit ikki fæst í. Tó eru nógv dømi um, at alment innlit er givið í viðurskifti hjá almennum partafeløgum í Norra. Eisini eru dømi um, at partar av virkseminum hjá almennu partafeløgunum í Norra eru fevnd av almennum innliti, meðan innlit ikki fæst í aðrar partar av virkseminum.

Í Norra er grundreglan, at sjálvt um okkurt má haldast innanhýsis í einum almennum partafelag – so er tað ikki eitt argument fyri at alt skal vera loyniligt.

Samanumtikið er Føroysk Miðlafólk av tí fatan, at innlitslógin er somikið grundleggjandi arbeiðsamboð fyri fjølmiðlarnar, at lógin eigur at fevna um øll partafeløg, ið tað almenna eigur. Vísir tað seg síðani, at nøkur viðurskifti í hesum almennu partafeløgum eru av slíkum slag, at haldgóðar grundgevingar eru fyri at halda tey innanhýsis, so má tað vera uppgávan hjá leiðsluni í felagnum at grundgeva sakliga fyri tí. Og hesar avgerðir mugu so sleppa at standa sína roynd – til dømis við kærumøguleika til Løgtingsins Umboðsmann.

Vinarliga

Føroysk Miðlafólk
Jón Brian Hvidtfeldt, formaður